Lívdin
- í lívd hins hægsta

November 2008

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

# Temadagur um forbønartænastu



*Hjúnini Preben Hansen og Erna Háberg frá forbønartænastuni í Lívdini.* Mynd: Tórvør Vang

Í sambandi við forbønartænastuna í Lívdini verður temadagur á Brekku leygardagin 15. november kl. 9.30.

Tað eru hjúnini Erna Háberg og Preben Hansen, sum skipa fyri degnum. Tey leggja dent á, at øll áhugað eru vælkomin til temadagin, og eingin skal kenna seg at vera noyddan at luttaka í forbønartænastuni, hóast tey eru við hendan dagin.

Byrjað verður kl. 9.30 við morgunmati. Á middegi, umleið kl. 12, verður farið oman í FK í Hoyvík til døgurða (døgurðin kostar kr. 50,-). Temadagurin endar í seinasta lagi kl. 16.

Áhugað kunnu tekna seg á telefon 228004 ella teldupost: preben@post.olivant.fo.

## Gloymdir lutir

Tá vit rigga av eftir møtini sunnudag, kemur tað javnan fyri, at ymsir lutir liggja eftir. Tað kann verða klæðnalutir, hjá bæði børnum og vaksnum, príðislutir, bíbliur o.s.fr.

Tey, sum finna gloymdar lutir, verða biðin um at leggja teir í kassan, og tey, sum hava mist okkurt, kunnu leita í kassanum.



## Hvat eyðkennir Lívdina?

Í Ápostlasøguni síggja vit, at samkomurnar vóru sera ymiskar. Soleiðis eigur tað at vera. Tá ið onkur spyr: „Hvørji samkomu gongur tú í?“, so skulu vit ikki skammast við at siga, hvønn trúarbólk vit hoyra til. Ikki skammast við røtur okkara. Men tað týdningarmiklasta er ærliga at kunna siga: „Eg gangi í eini samkomu, sum er bíbilsk í læru, opin í stíli, náðirík móti menniskjum og viðkomandi í samfelagnum.“ Hetta er ein góður endamálssetningur fyri allar samkomur. Samkoman í Jerúsalem var tann stóra samkoman, sum var sett saman av mongum ymiskum menniskjum. Samkoman í Antiokia var ein trúboðanarsamkoma. Samkoman í Tessalonika var ein opin og náðirík samkoma, sum hugsaði um onnur meiri enn um seg sjálva. Samkoman í Filippi var eyðkend av gleðifyltum einleika í ymiskleika. Kanst tú í einum setningi at siga hvat eyðkennir Lívdina?



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Christmas Child góða undirtøku

Seinasti dagur at lata skógvaeskjur til Christmas Child var sunnudagin 26. oktober 2008.

Hetta er sætta árið hjá Operation Christmas Child í Føroyum. Umleið 45 samkomur, kirkjur og felagsskapir eru við í tiltakinum umframt nakrir skúlar.

Skógvaeskjurnar úr Føroyum fara hesaferð til Kyrgyzstan, Rumenia og Serbia. Eskjurnar verða latnar børnum, sum eru fátøk, foreldraleys, sjúk, ella á annan hátt hava brúk fyri eini jólagávu.

Inn komu 3.288 skógvaeskjur sum er næstan 300 eskjur meira enn í fjør.

Vit takka øllum sum hava stuðlað tiltakinum.

*Vegna Operation Christmas Child*
*Durita Djurholm og Beinta Áargarð*



*Myndir: Tórvør Vang*

## Bønarløtur á Brekku

Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 8.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen sum skipa fyri.

## Tillukku við barninum

Joan Danielsen og Signar Johannesen í Hoyvík hava ættleitt ein drong, sum eitur Josva Signarson. Hann er føddur tann 6. des. 2007 í Etiopia og kom til Føroya 19. juli 2008.



*Myndir: Gvøðni og Janus Gunnarsson*

## Høgni vann almenna kjakið

6. oktober var Høgni Johannesen fyri fyrstu ferð við í almennum orðaskifti við ein muslim í Birmingham. Evnið var Bíblian og Koranin. Muslimurin er talsmaður fyri ein bólk av ungum monnum, sum eru vanir at kjakast, m.a. við kristin, í eini gongugøtu í Birmingham.

Tað gekk sera væl hjá Høgna í orðaskiftinum, og muslimurin mátti aftaná viðganga, at Høgni hevði „vunnið". Høgni hevði undan orðaskiftinum greitt frá, at um hann vann, kundi gerast rok, tí muslimum dámar sera illa at tapa eitt slíkt orðaskifti, men tíbetur gekk alt friðarliga fyri seg.

Høgni vónar og væntar, at góða úrslitið fer at gera, at dyr fara at verða latnar honum upp, soleiðis at hann framyvir kann luttaka í orðaskiftum á hægri støði og eisini kann fáa møguleika at halda skeið um trúvirði Bíbliunnar í samkomum og aðrastaðni.

**Bæði í Føroyum, Onglandi, Pakistan og ivaleyst aðrastaðni við varð nógv biðið fyri Høgna í sambandi við orðaskiftið. M.a. var eitt serstakt bønarmøti uppi á Brekku alla tíðina, meðan orðaskiftið var. Høgni takkar hjartaliga øllum, sum hava biðið fyri honum.**

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 4. nov. | Bønarløta |
| 11. nov. | Bønarløta |
| 18. nov. | Húsbólkur |
| 25. nov. | Bønarløta |

## Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 fyrrapart er mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin er fríggjadag í líka viku, t.v.s. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.

## Skeið fyri hjún á Hotel Norð

Lívdin skipar fyri PREP-skeiði á Hotel Norð á Viðareiði í vikuskiftinum 6.-8. februar 2009. Skeiðið er fyri øll, ið vilja fáa íblástur og vegleiðing at samskifta og at liva saman sum hjún.

Vit byrja fríggjakvøld við nátturða og enda sunnudag seinnapart. Tit skulu ikki hugsa um matgerð, uppvask, avrudding, arbeiði ella børn. Tit skulu bert hugsa um tykkum sjálvi!

Skeiðið er lætt og stuttligt, og skift verður millum undirvísing, venjingar og hugna. Grundarlagið fyri skeiðnum er bíbilskt, men tað byggir eisini á vísindaligar kanningar við hjúnum gjøgnum 30 ár.

Kostnaður er 3.400 kr fyri parið. Kostnaðurin umfatar gisting við fullum kosti og undirvísingartilfar. Pláss er fyri 13 pørum. Undirvísarar vera Unn og Jógvan Zachariassen og Durita og Pauli Djurholm.

Tilmelding fer fram hjá Paula og Duritu Djurholm á teldupostadressuni: prep@livdin.fo ella á tlf 316099. Depositum á 1.000 kr verður goldið við tilmelding og restin seinast 14 dagar undan skeiðnum á konto 9181-161.551.5. Peningurin verður ikki endurgoldin, men tit kunnu sjálvandi bjóða øðrum pari tykkara pláss, um tit fáa forfall.

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 2. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Petur Hansen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Maðurin, áðrenn hann fer á ferð*<br>*Talari: Poul Guttesen* |

### Sunnudagin 9. november

| | |
|---|---|
| **Eitt møti:** 10.30-11.30 | *Familju- og lovsongsmøti* |

### Sunnudagin 16. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Jóhan Syderbø* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan 15: Fyrsti samkomufundurin í Jerúsalem og týdningur hansara fyri okkum í dag.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen*<br>** Bøn fyri børnum* |

### Sunnudagin 23. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Unn Zachariassen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan 21-28: Paulus, rómverjin, sum búi í einum grikskum býi við jødiskari útbúgving*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 30. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Hans Arni Jensen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni:. Ápostlasøgan: Evangeliið verður prædika óhindrað (yvirlit yvir alla Ápostlasøguna)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |




Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo